**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

Argir, 29. mai 2015

**Svar**

**upp á**

**fyrispurning nr. 98/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Bill Justinussen, løgtingsmanni, um ólógligan innflutning av rúsevnum**

**Spurningur 1**
Hvørji átøk ger tollvaldið fyri at steðga ólógligum innflutningi av rúsevnum?

**Svar:**
Tollvaldið er á flogvøllinum til hvørt flogfar, sum kemur úr útlandinum, og serligt fokus er á at avdúka møgulig rúsevni.

Tollvaldið er dagliga á posthúsinum og hevur eftirlit við pakkum, fyri at tálma ólógligum innflutningi av rúsevnum, sum kunnu koma gjøgnum postin.

Tollvaldið er til reiðar, hvørja ferð Norrøna kemur til Føroyar, og hevur eftirlit við ólógligum innflutningi av rúsevnum, sum kunnu koma við ferðafólki við Norrønu.

Tá onnur skip og bátar koma til Føroyar, er tollvaldið á staðnum fyri at avdúka møgulig rúsevni, sum kunnu koma við útlendskum og føroyskum fiskiskipum og handilsskipum.

**Spurningur 2**
Hvussu nógvar sonevndar hashhundar hevur tollvaldið tøkar?

**Svar**
Tollvaldið hevur ein rúsevnishund í løtuni. Her kann nevnast, at løgreglan eisini hevur ein rúsevnishund, sum veitir eina hjálpandi "nøs" um neyðugt.

**Spurningur 3**
Hvussu nógv kostar útvegan og rakstur av einum hashhundi?

**Svar:**
Kostnaðurin av at útvega ein vandan rúsevnishund og at hava ein hundaførara á skeið er umleið kr. 600.000, - 650.000.

Raksturin av einum rúsevnishundi er í høvuðsheitum kostnaðurin av at hava ein hundaførara, sum er tengdur at hundinum. Harumframt er eitt árligt skeið í Danmark saman við donskum hundaførarum, og til síðst djóralækni, matur o.a. Ein meting av hesum er umleið kr. 500.000 um árið.

**Spurningur 4**
Hvørji átøk ger tollvaldið, umframt tey vanligu, á flogvøllinum og umborð á Norrønu?

**Svar**
Greitt er í høvuðsheitum frá átøkunum hjá tollvaldinum í svarinum til spurning 1. Tað er ikki rætt alment út í asir at greina, hvussu tollvaldið arbeiðir, av tí at hetta kann skaða sjálvt eftirlitið. Tó kann upplýsast, at tollvaldið umframt hashhundin hevur stóra nyttu av røntgum og atgongd til ferðafólkalistar.

**Spurningur 5**
Hvussu verða átøkini samskipað við aðrar myndugleikar, serliga løgregluna?

**Svar:**
Tað er ikki rætt alment at greina út, hvussu átøkini verða samskipað, av tí at hetta kann skaða eftirlitið.

Eg havi tó fingið upplýst frá tollvaldinum, at tollvaldið hevur sera gott samstarv við løgregluna og aðrar almennar stovnar og útlendsk tollvald. Eisini hevur tollvaldið sera gott samstarv við vinnuna.

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður